# 48 portørar meldað seg úr Havnar Arbeiðsmannafelag



*Hesir tríggir handaðu Bárði Nielsen undirskriftirnar. 48 portørar hava skrivað undir uppá, at teir meldað seg úr Havnar Arbeiðsmannafelag, og at teir vilja gerast partur av Starvsmannafelagnum. Frá vinstru: Heri Petersen, Gunnar Hjelm, formaður í bólkinum fyri teir 48 portørarnar og Asbjørn Knudsen. Í hondini hevur Gunnar Hjelm skjalið við undirskriftinum*

*Mynd: Heini S. Kristiansen*

**Stríðið hjá portørunum at gerast partur av Starvsmannafelagnum hevur nú ført við sær, at 48 portørar hava meldað seg úr Havnar Arbeiðsmannafelag frá 1. oktobur. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, er gjørdur varugur við, at teir vilja gerast limir í Starvsmannafelagnum**

FAKFELAGSSKIFTI
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Í gjár handaði ein bólkur av portørum Bárði Nielsen, landsstýrismanni í fíggjarmálum og Hans Joensen, formanni í Føroya Arbeiðsmannafelag eitt skriv við undirskriftum frá 48 portørum um, at teir melda seg úr Havnar Arbeiðsmannafelag (HA) frá 1. oktobur. Teir gera greitt, at teir ynskja at gerast limir í Starvsmannafelagnum.

Formaður í bólkinum, sum varð stovnaður eftir eina atkvøðugreiðslu fyri trimum mánaðum síðani, er Gunnar Hjelm.

- Fyri trimum mánaðum síðani høvdu vit eina atkvøðugreiðslu, sum greitt vísti, at meirilutin vil gerast limur í Starvsmannafelagnum. Vit føla, at vit eru feilplaseraðir í HA, sum er fyri ófaklærd arbeiðsfólk, tí at vit eru faklærdir. Vit fáa ikki nóg góðar sømdir í HA, sigur hann.

### Hava rætt at velja

Portørarnir hava í tríggjar mánaðir arbeitt við at gerast partur av Starvsmannafelagnum. Nú hava teir so tikið tað stóra stigið at melda seg úr Havnar Arbeiðsmannafelag.

- Vit hava rætt til sjálvir at velja, hvørjum fakfelag vit vilja vera í, sigur Gunnar Hjelm

Lønardeildin hevur ikki gingið áheitanunum frá portørunum á møti um at koma á fund við teir, Starvsmannafelagið og Havnar Arbeiðsmannafelag.

- Vit hava tríggjar ferðir vent okkum til lønardeildina hjá fíggjarmálaráðnum og biðið um samráðingar millum okkum, lønardeildina og Starvsmannafelagið, men teir hava ikki verið sinnaðir til tað, tí at teir eru í samráðingum við HA, sigur Gunnar.

### Bíða eftir fundi

- Tá ið ein ósemja er, mugu partarnir seta seg niður at tosa um trupulleikarnar. Annars verður ósemjan ikki loyst. Ti bjóða vit hervið landsstýrismanninum á fund við okkum, sigur Gunnar Hjelm.

Nú bíða teir einans eftir, at lønardeildin vil koma á fund við teir, so at teir kunnu hoyrast. Lønardeildin má góðkenna ein sáttmála millum partarnar, tí at annars kunnnu teir einans gerast óvirknir limir í Starvsmannafelagnum. 48 portørar skrivaðu undir, meðan 8 ikki hava skrivað undir.

# Alternativ ansing í Havn

**Býráðið í Havn hevur keypt eina trøð Yviri við Strond. Har er ætlanin at byggja høli, sum skal rúma alternativa ansing, sum skal hjálpa teimum eldru at gerast virkin partur av samfelagnum. Býráðið fer eisini at gera eldraíbúðir í Óðinshædd**

ELDRAØKIÐ
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Býráðið í Havn hevur keypt eina trøð Yviri við Strond, sum eftir ætlan skal nýtast til at byggja eitt høli, sum skal vera sambýli, røktar- og ellisheim í einum. Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn greiðir frá, at tað er stórur tørvur á ansingarplássum til gomul.

- Tørvurin verður ikki nøktaður sum er, og tí vóna vit, at hendan loysnin kann gerast veruleiki sum skjótast. Vit hava ikki havt málið til politiska viðgerð, men vit hava keypt grundstykkið, og vónandi fara teir skjótt at byrja at byggja, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

### Alternativ ansing

Katrin Dahl Jakobsen er forkvinna í sosialu nevnd í býráðnum. Hon greiðir nærri frá ætlanunum Yviri við Strond:

- Vit hava verið á kunningarferð í Danmark, har ið vit sóu nøkur dømi um alternativa ansing. Í Føroyum verður altíð tosa um at byggja røktarheim ella sambýli ella ellisheim. Loysnin, sum vit arbeiða við, er ein samansjóðing av øllum. Endamálið er, at tey eldru kunnu í størri mun gerast ein partur av samfelagnum.

- Fleiri eldri fólk eru før fyri at gera nógv, hóast tey hava tørv á røkt. Á nýggja økinum fara tey at fáa møguleika at gerast virkin í samfelagnum, og tey kunnu eisini fáa vitjunartænastu. Á henda hátt kunnu vit á besta hátt nýta okkara tilfeingi, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Sosiala nevnd hevur fingið ráðgeving frá Torben Nilsen, sum eisini er ES ráðgevi innan menning av teimum gomlu. Tí halda tey, at tey hava funnið eina góða loysn við nýggju alternativu ansingini.

### Eldraíbúðir í Óðinshædd

Býráðið hevur eisini ítøkiligar ætlanir um at gera eldraíbúðir í Óðinshædd.

- Tað verða gjørd 10 hús við tveimum íbúðum í hvørjum húsi. Soleiðis verða 20 pláss afturat, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Tey eldru kunnu tí vænta, at stóri tørvurin á eldraíbúðum og ansingarplássum verður nøktaður til eitt vist í nærmastu framtíð.



*- Fleiri eldri fólk eru før fyri at gera nógv, hóast tey hava tørv á røkt. Á nýggja økinum fara tey at fáa møguleika at gerast virkin í samfelagnum, og tey kunnu eisini fáa vitjunartænastu, sigur Katrin Dahl Jakobsen, forkvinna í sosialu nevnd í Tórshavnar Býráð.*

Hans Joensen:

# Portørarnir fáa ikki betri sømdir aðrastaðni

**Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag harmast um, at portørarnir melda seg úr felagnum. Hann sigur seg ikki skilja grundgevingarnar til at skifta fakfelag. - Teir fáa ikki betri sømdir aðrastaðni, sigur hann**

FAKFELAGSSKIFTI
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag (HA) hevur fingið boðini frá portørunum um, at teir melda seg úr felagnum frá 1. oktobur at rokna. Hann skilir tó ikki heilt grundgevingarnar hjá portørunum:

- Sum eg skilji tað, eru teir ikki nøgdir við tær lønartreytirnar, sum teir fáa í HA. Teir meta, at teir fáa betri sømdir í Starvsmannafelagnum, men hetta er ikki rætt. Eg rokni ikki við, at teir fáa betri sømdir har.

### Faklærdur - líka mikið

Portørarnir vísa á, at teir eru faklærdir, og tí eiga teir at vera við í einum fakfelag fyri faklærd.

- Tað er ikki avgerðandi, um limirnir eru faklærdir ella ikki. Tað er helst eisini onkur limur í Starvsmannafelagnum, sum er ófaklærdur, sigur Hans

Hans harmast, at portørarnir hava tikið hesa avgerð, men hann viðurkennir, at teir hava rætt til tað.

- HA kann ikki nokta teimum at fara. Vit kunnu ikki noyða nakran at vera lim í okkara fakfelag. Men økið hevur hoyrt til HA síðani 60´ini, so tað er ikki nakað, sum vit uttan víðari vilja geva frá okkum, sigur hann.

### Átta portørar eftir

Teir átta portørarnir, sum ikki hava skrivað undir, halda fram sum limir í HA.

HA ætlar sær ikki at fara á fund við Starvsmannafelagið, og teir hava ongantíð fingið fundarboð frá portørunum um hetta málið.

- Starvsmannafelagið sendi okkum fundarboð, og teir fingu svar frá okkum. Vit vilja ikki fara á ein fund við Starvsmannafelagið, tí at vit hava einki at tosa um. Portørarnir hava ongantíð sett seg í samband við okkum í hesum málinum. Nú hava teir so bráðliga savna inn undirskriftir og tikið hetta ógvusliga stigið, staðfestir Hans Joensen at enda.